Fyrireika seg til NM

Frá 30. juli og fram til 6. august verður NM kapping fyri U 17 landslið í fótbólti í Føroyum.

Pætur Clementsen og Finn Johannesen, U17 landsliðsvenjarar, hava í eina tíð havt úttøkuvenjingar. Frá 16. og fram til 23. juli skal liðið luttaka í kapping í Aberdeen, og í vikuni hava teir ájtan, sum skulu umboða Føroyar í Aberdeen, fingið boð.

Teir boðsendu eru Hans Jørgensen og Erland Berg Danielsen, SKÁLA, Sámal J. Djurhuus, FS Vágar 2004, Viljormur Davidsen, Heri Nesá, Klæmint Olsen, Karl Løkin, Jóhan Símun Edmundson, Petur Meinard Magnussen og André Olsen, NSÍ, Rógvi Holm, AB, Gunleif Olsen, TB, Andrias Ellingsgaard, Eli Simonsen og Páll Klattskarð, KÍ, Erling Jacobsen, GÍ, Sjúrður Thomassen, B36, og Gunnar Thomsen HB.

Nýggjur svimjivenjari

Heimasíðan hjá Havnar Svimjifelag veit at siga, at Kristian Martin Joensen er settur sum nýggjur høvuðsvenjari hjá felagnum. Kristian Martin kemur soleiðis at standa fyri venjingini hjá teimum trimum fremstu liðunum hjá felagnum, og hartil skal hann hava eitt eyga við í venjingunum hjá yngru feløgunum. Kristian Martin, sum hevur drúgvar royndir sum bæði svimjari og venjari, er í løtuni eisini hjálparvenjari hjá føroyska A-landsliðnum.

-mørk

Latið nú dómstolin tala

Stjórin í P/F Havnar Fótbóltur tóktist nøgdur um úrskurðin, sum Føroya Rættur tók.

– Lat meg fyrst og fremst siga, at vit avgjørt ikki eru fegnir um hetta stigið. Men vit kendu okkum somikið maktarsleysar í málinum, at hetta var okkara einasti útvegur.

– Nú er tað so staðfest, at Ítróttardómstólurin skal sleppa framat. Um teir taka málið upp, og um teir geva okkum viðhald ella ikki, fáa vit sjálvandi ikki sagt í løtuni. Men vit halda tað vera týdningarmikið, at hægsti ítróttardómstólurin sleppur at siga sína hugsan. Og fyrr enn tað er gjørt, er tað ikki rætt, at EB/Streymur spælir – líkamikið um tann dysturin so verður móti HB ella VB/Sumba, segði Steinfinnur.

-mørk

FSF á fund mánakvøldið

Tað vóru ikki tær stóru viðmerkingarnar, sum FSF-forsetin, Óli Holm, hevði til úrskurðin í Føroya Rætti.

– Nú er talan so um eina nýggja støðu, og hana fara vit at viðgera á fundi, sum ætlandi. Og fyrr enn tá havi eg so onga ítøkiliga viðmerking til verður mánakvøldið. málið.

– Men tað er greitt, at hetta er í stríð við føroysku fótbóltslógirnar. Har stendur beinleiðis, at tað er føroyskur fótbóltur – og ikki sivilrætturin – sum tekur støðu í fótbóltsmálum. Og viðvíkjandi heimildunum hjá Ítróttardómstólinum er okkara støða óbroytt. Vit halda framvegis ikki, at dómstólurin skal taka eitt slíkt kappingarmál upp, eru einastu viðmerkingarnar, sum Óli Holm vil gera í løtuni.

-mørk

Endurgjald kann gerast aktuelt

Tað mundi neyvan ræða nakran í HB, at FSF nýtti tær 500.000 UEFA-krónurnar sum grundarlag. UEFA pengarnir kunnu koma bara koma í vanda, um steypakappingin ikki er avgreidd, tá farið verður undir lutakastið til næstu útgávuna av UEFA-cup. Og tað verður so ikki fyrr enn í juni komandi ár.

Tí undraði tað fleiri, at FSF ikki heldur nýtti eina møguliga flyting av steypafinaluni sum kautiónsgrundarlag. Tað er valla nøkur loyna, at tað faktum, at steypafinalan verður spæld á ólavsøku helst hevur onkra staðni millum 1.000 og 2.000 eyka áskoðarar við sær, og tann peningurin er í ítøkiligum vanda, skuldi tað hent, at kappingin verður avgreidd seinni.

Hinvegin kann eingin forða FSF fyri eisini at reisa endurgjaldskrav til ta tíð, um hetta skuldi verði støðan. Men tá hetta ikki varð nevnt í fútarættinum, er tað nú ikki eins líka til hjá FSF at reisa hetta kravið.

-mørk

HB fekk rætt í rættinum

Fútarætturin gav HB viðhald í, at Ítróttardómstólurin skal tala, áðrenn nøkur fjórðingsfinala verður spæld. Móti at seta trygd upp á hálva millión fekk HB sett fútaforboð fyri, at EB/Streymur og VB/Sumba skulu spæla

FÓTBÓLTUR

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

HB-stuðlarnir gjørdu skjótt av. Teinurin úr rættinum í bankan er ikki langur, og eftir fáum minuttum komu stuðlarnir aftur við stóra kekkinum, sum varð deponeraður hjá Føroya Rætti
Mynd: Álvur Haraldsen

Rættarsalur 2 var í minna lagi, tá málið um møguligt fútabann fyri einum fótbóltsdysti skuldi avgerast. Talan var um higartil seinasta leikin í drúgva málinum um spæliloyvið hjá Páll M. Joensen, og var tað HB, sum hevði biðið um fútabannið. Hetta tí teir mettu, at tað var um undirgraving av kæruni hjá HB til Ítróttardómstólin, um dysturin hjá EB/Streymi varð avgreiddur, áðrenn Ítróttardómstólurin hevði havt møguleika at siga sína hugsan um málið.

Grundgevingarnar

HB grundgav sína støðu við, at teir hava kært málið fyri Ítróttardómstólin, og at tað tí er ein provokatión frá Kappingarnevndini, tá hendan hevur ásett, at dysturin á Eiði skuldi spælast í kvøld.

Fótbóltssambandið fórdi fram, at teir als ikki meta, at Ítróttardómstólurin hevur rætt at viðgera slík mál, og at kæran frá HB tí als ikki kundi takast í álvara. Hartil fórdi FSF fram, at um so var, at fútabann varð sett, skuldi HB veita bankatrygd fyri 500 tkr. Hetta er peningur frá UEFA, sum FSF metir stendur í vanda, um steypakappingin ikki verður avgreidd sum ætlað.

Hartil fórdi FSF fram, at áheitanin frá HB um fútabann ikki leyk reglurnar í fyrisitingarrætti. Ein merkisverd grundgeving í sjálvum sær, tá FSF støðugt hevur roynt at hildið eitt nú fyrisitingarrættarligu reglurnar uttan fyri fótbóltsheimin.

Dómstólurin skal tala

Tá dómarin talaði, var hon tó ikki samd við FSF um, at áheitanin frá HB ikki leyk reglurnar um fútabann. Tó metti hon, at tá FSF metir seg hava 500 tkr. í klemmu, um steypakappingin ikki verður avgreidd eftir ætlan, skuldi HB veita trygd fyri hesum peningi.

Ein løtu var tøgn í salinum, og tað tóktist, sum skuldi stóra talið sodna. Men tá sakførarin hjá HB spurdi, hvar peningurin skuldi setast inn, var fútabannið greitt. Fáar minuttir seinni komu umboð fyri HB í rættin við stóra kekkinum, og so stóð greitt, at ítróttardómstólurin skal tala.

Tí hvørt FSF vil tað ella ikki, so verður tað nú upp til teirra, um steypakappingin kann avgreiðast. Hóast lógir FSF's siga nakað annað, so skerst ikki burtur, at við einum fútabannið yvir leikvøllin, so ber illa til at spæla dystin millum EB/Streym og VB/Sumba, áðrenn ítróttardómstólurin hevur talað. Og gongst eftir ætlan, so verður hetta tann 10. juli. 107 dagar eftir, at HB og VB/Sumba spældu í Gundadali…

Símun meistari fyri fleiri málum

Óføri vágbingurin í Keflavík staðfesti í gjárkvøldið 5-0 sigurin, eftir at hann hevði verið við í uppspælinum til fleiri av hinum málunum

ÍSLAND

Jóannes Hansen

9. umfar í íslendsku landskappingini er á skránni í hesi vikuni. Í kvøld eiga Rógvi Jacobsen og KR heimavøll móti Vali. Í gjárkvøldið hevði Keflavík við framúr væl uppløgdum Símuni Samuelsen í vinstra borði heimavøll móti Breiðablik úr Kópavági.

Breiðablik hevur staðið seg lutfalsliga væl, síðani teir aftur komu í fremstu deildina, meðan tað hevur gingið minni væl enn roknað varð við hjá Keflavík í átta teimum fyrstu umførunum. Hesa ferð var tó eingin ivi. Eftir eitt sindur trilvandi byrjan var Keflavík flúgvandi og vann 5-0.

Símun Samuelsen var allar 90 minuttirnar framúr væl upplagdur í vinstra borði. Seytjan minuttir fyri leiklok staðfesti hann rimmar sigurin. Frammanundan hevði hann verið við í uppspælinum til fleiri av hinum málunum, og hann hevði eisini vandamiklar royndir móti málinum.

At sjálvsálitið er í toppi sæst í, at í fleiri álopum, sum bóru mál við sær, megnaði Símun Samuelsen at sneiða mótstøðumenn av sær og at stevna í brotsteigin, soleiðis at tað uppstóðu yvirtalsstøður, áðrenn føroyski landsliðsmaðurin slepti bóltinum til leysan mótstøðumann.

Leygardagin skal Keflavík spæla á útivølli móti norska Lillestrøm í Intertoto Cup.

Dysturin millum KR og Val verður tann síðsti í 9. umfari. Tá ið hann er avgreiddur, verður íslendska landskappingin hálvrunnin. Tvífalda meistaraliðið FH, sum í gjárkvøldið vann 2-0 á heimavølli móti Grindavík, er oddalið við 23 stigum. Víkingur, sum vann 4-1 á útivølli á Akranesi hevur 14 stig. Grindavík hevur 13 stig saman við Fylki, ið spældi 1-1 á heimavølli móti ÍBV. KR hevur 12 stig undan lokaluppgerðini móti Vali, sum saman við Keflavík og ÍBV hevur 11 stig. Breiðablik hevur 10 stig.

Í gamla felagnum hjá Una Arge, ÍA á Akranesi, er hýrurin ringur. Eftir 4-1 tapið á heimavølli móti Víkingi er ÍA einsamalt í botnum við bara seks stigum.